## Hvør fjalir seg í ferðataskuni?

Onnur bókin um Viktoriu og pingelipongin, sum Marjun S. Kjelnæs hevur skrivað og Hanni Bjartalíð myndprýtt. Fyrsta bókin, Hvør fjalir seg í postkassanum, segði frá um pingelipongin, sum Viktoria ein dagin fann í postkassanum uttan á húsunum. Eftir hetta broytist gerandisdagurin hjá henni, alt verður so øðrvísi og spennandi. Í bókini, ið nú er komin út, fer øll familjan til Jameika at ferðast, og heimaftukomin varnast Viktoria, at ein pingelipongur hevur sníkt seg við í ferðataskuni. Hvussu leikur fer, tá ið okkara pingelipongur og tann femmandi hittast, skal ikki avdúkast, men tað gongur ikki spakuliga fyri seg. Bókin, sum er 56 blaðsíður, er innbundin og kostar 180 krónur og er væl egnað bæði at lesa upp fyri smáum børnum og at lesa hjá børnum.

## Salmiakk verður happaður



Salmiakk býr úti á bygd í Norðnesi og verður altíð happaður, Kanska serliga tí, at hann er komin úr býnum út á bygd at búgva. Tað ringasta er, at hann ongan vin eigur at spæla við, og hetta ynskir hann sær allarmest av øllum. Og so ein dagin flytur Spøki inn í kamarið hjá Salmiakk, og síðan verður alt broytt, tí hann gevur Salmiakk dirvi at standa ímóti ágangi. Mono Nilsson-Brännström, ið skrivað hevur bókina, hevur nógv upp á hjartað. Her verður sagt frá um happing, tunglyndi, skilnað, men eisini um góðsku og tryggleika. Hóast evnið er álvarsamt, so er bókin ikki syrgilig, men tvørturímóti er hon á tremur við skemti, varma og klikkaðum hugskotum, og so hevur hon fitt av álvara í sær eisini. Salmiakk og Spøki er 210 blaðsíður, heft og væl egnað til tey 10-12 ára gomlu. Bergur Rasmussen hevur týtt úr svenskum. Kelda: bfl.fo




### 10. útgávan

**Bókin hesa ferð, er tíggjunda útgávan av Songbók Føroya Fólks. Tað eru 95 ár síðan fyrsta Songbók Føroya Fólks kom út. Alla tíðina hevur H.N. Jacobsens bókahandil verið við í virkingini av bókini. Ritstjórarnir til hesa uppgávuna eru Malan Marnersdóttir, Turið Sigurðardóttir og Eivind Weyhe. Afturat sær hava tey havt nógv samskifti við yrkjarar og onnur bókmentafólk, fyri at velja nýggjar sangir og sálda onkrar frá hesum føroyska skatti.**
**Astri Luihn hevur gjørt permuna til hesa útgávuna, og skal perman ímynda sjógv og fugl. Nakað, ið eyðkennir verkini hjá Astri Luihn.**
**Síðan fyrstu útgávuna í 1913 er nógv broytt, og nógvir nýggir sangir komnir við í hendan føroyska mentanararvin. 512 í mun til 547 í undanfarnu útgávu.**




*Hanus Johansen, fólkasangari, undirhelt*

# 30 nýggir sangir handan buldrandi permu

**Umleið 30 nýggir sangir eru í tíggjundu útgávuni av Songbók Føroya Fólks. Tað sum er broytt síðan seinast, er serliga nýggja perman, umframt tað eru heili 30 sangir komnir við, ið ongantíð hava verið í sangbókini áður**

SANGBÓK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í gjár kom nýggj útgáva av Sangbók Føroya Fólks. Stórar broytingar eru hendar, og serliga loypir perman meira í eyguni, enn seinastu níggju útgávurnar av bókini, ið hava verið brúnar og myrkabláar. Talan er hesaferð um eitt listaverk, sum Astri Luihn hevur virkað. Sóljugula skriftini í yvirskriftini stendur í stórari andsøgn til døkku bakgrundina. Men spurningurin er, hvussu hendan markanta broytingin fer at vera upptikin millum fólk, sum eru von við at bókin er einslitt.

### 30 nýggir sangir

Í hesi útgávuni av Songbók Føroya Fólks eru umleið 30 nýggir sangir. Harímillum teljast til dømis »Pápi er óður, og mamma er ill«, sum Aleksandur Kristiansen hevur yrkt. Kári Petersen, Mikkjal á Ryggi og Tummas Napoleon Djurhuus hava eisini fingið fleiri sangir, samstundis sum Petur Mohr Dam og Thomas Moore eru nýggir í Songbókini. Tann seinni tó í týðing hjá Hanusi Kamban.

### Sangirnir skulu syngjast

Malan Marnersdóttir var við til at ritstjórna hesi tíggjundu útgávuni av songbókini. Hon metir at fyrsta treyt, fyri at ein sangur skal koma við er, at tað skal bera til at syngja teir í eini fjøld.

- Nógvir góðir sangir, ið koma út á fløgu ber als ikki til at syngja. Sama er við nógvum yrkingum, ið eru skrivaðar á ein hátt, so tað ikki ber til at syngja tær. Men sangurin skal eisini vera góður. Tað skulu vera góðar yrkingar, samstundis sum fólkið skal hava tikið teir til sín, greiðir Malan Marnersdóttir frá, samstundis sum hon leggur dent á, at tað ikki bara eru tey trý, ið hava avgjørt, hvat er komið við og ikki.

### Skal vera til fólkið

Malan Marnersdóttir roknar við at fólk fara at taka bókina til sín, á sama hátt sum allar hinar útgávurnar.

- Tey flestu fáa í minsta lagi eina ferð í lívinum ein Føroya fólks, antin í konfirmatiónsgávu, próvtøkugávu og brúdleypsgávu. Mangir skúlar eiga eitt flokssett. Til tey er at siga: nú er tíð at keypa eina nýggja songbók, sigur Malan Marnersdóttir um hesa nýggju og tíggjundu útgávuna av Songbók Føroya Fólks.



*Malan Marnersdóttir, sum hevur verið við til at ritstjórna 10. útgávu av Føroya Fólks*